# Tónleikur í góðum læruumhvørvi

**Síðuvinningar**

Økt tónleikaundirvísing í fólkaskúlahøpi gevur eisini  nógvar síðuvinningar. Gjøgnum tónleik læra børnini:
1: Í ljóðførisfrálæru at mennast motoriskt skjótari og betur enn vanligt.
2: Í ljóðførisfrálæru og hoyrilæru at menna konsentratiónina - og harvið evnini at læra - skjótari og betur enn vanligt.
3: Í samanspæli at lurta eftir hvørjum øðrum, at hoyra og síggja í verki týdningin av at lyfta í flokk og spæla saman.

**Litir í Leiki.** Verkætlanin er upprunaliga eftir finskum leisti, sum ein ungverji, Géza Szilvay, búsitandi í Helsinki, hevur sett á stovn eftir kenda Kodály-námsháttinum til tess at læra børn at spæla ljóðføri og á tann hátt at fremja menningartilgongd teirra fakliga og sosialt.  Royndir aðrastaðni hava víst, at tað at geva børnum høvi til dagligt samband við tónleik ikki bara fremur teirra førleika til tónleikaligt virksemi, men eisini letur upp sál og sinni fyri allari aðrari innlæring og menning, kropsligari eins væl og sálarligari. At Føroya Læraraskúli og Fróðskaparsetur Føroya vísa hesari skúlaroynd vísindaligan ans, verður vónandi haraftrat eitt áhugavert íkast til framtíðar skúlaframburð her á landi.

Géza Szilvay er ættaður úr Ungarn og kom til Finnlands saman við bróður sínum Csaba Szilvay í 1973. Síðan tá hava teir arbeitt saman sum tónleikalærarar - Géza í violin- og Csaba í cellospæli. Báðir hava teir útbúgving frá kenda tónleikastovninum Franz Liszt akademiinum í Budapest.

G. Szilvay hevur saman við fólkaskúlaleiðaranum Heikki Varis stovnað verandi skúlan. Teir byrjaðu at arbeiða saman við hesari verkætlan í 1993. H. Varis hevur fólkaskúlaútbúgving við tónleiki sum linjulærugrein, og umframt at hava leiðsluna av fólkskúladeildini um hendur undirvísir hann í hoyrilæru á musikkskúlanum.
So framúr gott gjørdist úrslitið av teirra samarbeiði, at teir í 1999 fingu myndugleikanna viðurkenning og eftir tað almennan fíggjarstuðul til sína serstøku skúlaskipan, sum musikkskúlafólk víða úr heimi eftirsíðan hava vitjað til.

Filosofiin aftan fyri hetta skúlasamstarv er, at royndir, fyrst og fremst í sokallaðu Kodály-skúlunum í Ungarn, hava víst, at daglig tónleikaundirvísing stuðlar undir í øðrum lærugreinum eisini og fremur menning hjá børnunum sum heild.




Zoltán Kodály (1882-1967) var ungarskt tónaskald og -granskari, sum saman við Bela Bartok tókst nógv við at savna inn og skráseta ungarskan fólkatónleik.

Kodály helt, at skuldu børn fáa mest burturúr tónleikainnlæring hevði tað týdning, at undirvísingin varð lagað eftir, hvussu børn fata og læra; til hetta menti hann sínar serligu handakeipur, ið hjálpa skuldu børnunum at skilja, hvørjir tónarnir eru, og hvussu teir ganga.

Handakeipurnar liggja til grund undir teirri relativu ***solmisatiónini***, ið brúkt verður í Kodály-háttinum. Hetta skal skiljast so, at keipurnar hjálpa børnunum at skilja, hvussu tónarnir liggja í mun til hvørjar aðrar. Men tað, at ***solmisatiónin*** er relativ, merkir, at heitini *do-re-mi* osfr. verða nýtt alt eftir, hvussu spældu tónarnir liggja í mun til hvørjar aðrar og ikki eftir traditiónellari hugsan, at *do* altíð er á C-tónanum!